gult6 cyan6 magenta6 svart6



# Barsilsskipanin umsitast í Suðuroy



*Karsten Hansen vísti eitt sindur av økismenning í verki, tá ið hann legði innkrevingina til nýggju barsilsskipanina til rættis*

**–Tað verður suðuroyardeildin hjá Toll- og Skattstovuni, sum skal umsita innkrevjingina til nýggju barsilsskipanina**

ØKISMENNING
*Áki Bertholdsen*

Karsten Hansen, landsstýrismaður í fíggjarmálum, vísti økismenning í verki, tá ið hann legði innkrevjingina í sambandi við nýggju barsilsskipanina í verki.

Hann hevur nevniliga avgjørt, at tað skal verða suðuroyardeildin hjá Toll- og Skattstovu Føroya, sum skal standa fyri innkrevjingini til nýggju skipanina.

Sjálv barsilsskipanin er eitt mál undir Vinnumálastýrinum, men innkrevjingin til skipanina er eitt fíggarmál, sum Fíggjarmálastýrið stendur fyri.

Og nú hevur so Karsten Hansen gjørt av at tað skal verða deildin hjá Toll- og skatt á Tvøroyri, sum skal umsita innkrevjingina.

## Fleiri fólk

Barsilsskipanin kom í gildi 1. juni. Allir løntakarar ímillum 16 og 67 ár, skulu gjalda 0,25% av inntøkuni til grunnin. Somuleiðis gjalda arbeiðsgevarar 0,25% av útgoldnari løn í grunnin. Gjaldið hjá løntakarunum verður tikin yvir skattin, men ein skipan skal gerast fyri arbeiðsgevararnar og sjálvstøðugt vinnurekandi.

Karsten Hansen sigur, at tað er ringt at siga, hvønn týdning hetta fær til Toll- og skattstovuna á Tvøroyri.

– Men tað er greitt, at tað verður brúk fyri meiri fólki. Um tað verða eitt ella tvey, ella hvussu nógv fólk, skulu setast í starv til at umsita innkrevjingina er ikki greitt enn, sigur Karsten Hansen, landsstýrismaður.

# Tey lágløntu skulu eisini fáa skattalætta

**Karsten Hansen, hevur sett hol á arbeiðið at broyta skattalógina. Hann sigur, at Løgtingið hevur álagt sær at geva teimum hægstløntu í Føroyum skattalætta. Men tað kemur ikki upp á tal, uttan, at tey lágløntu eisini fáa skattalætta**

SKATTALÆTTI
*Áki Bertholdsen*

Karsten Hansen, landsstýrismaður í fíggjarmálum, hevur sett hol á arbeiðið at broyta skattalógina.

Hann sigur at tað arbeiðið miðjar ímóti at lætta um skattin. Men talan verður ikki um ógvusligar skattalættar í einum.

– Tað er ímóti allari, búskaparligari ráðgeving at gjara ov nógv út, nú tíðirnar eru so góðar og tað ætli eg mær heldur ikki at gera. Sjálvt Carragataálitið vísir á, at tað er neyðugt at fara fram við varsemi, tá ið skattalættar verða veittir. Tað ræður eisini um at leggja upp fyri, so at vit hava ráð til skattalættar,tá ið tíðirnar versna aftur. Týdningin av hesum sóu føroyingar allarbest fyrst í nítiárunum. Høvdu politikararnir ikki havt gjarað so nógv út í áttatiárunum, hevði tað verið ráð til skattalættar í nítiárunum, og tað er helst óneyðugt at siga, hvønn týdning tað hevði havt fyri fólk. Men tað hevði landskassin ikki ráð til. Tvørturímóti var tað neyðugt at herða skattatrýstið við teirri avleiðing, at kreppan rakti nógv harðari, enn hon annars hevði gjørt, sigur landsstýrismaðurin í fíggjarmálum og tað støðuna vil hann ikki koma Føroya fólki í aftur.

## Lætta um hjá lág- og miðalinntøkunum

Hann vísir á, at løgtingið hevur álagt honum at broyta skattalógina so, at hjún verða skattað hvør sær,

Hann sigur, at tað, sum Løgtingið áleggur honum, má hann fylgja.

Men hann ger samstundis púra greitt, at hetta er ein broyting í skattalógini, sum ikki kann brúkast til nakað, sum hon er.

– Í mínari verð snýr tað seg fyrst og fremst um at geva lág- og miðalinntøkunum ein skattalætta. Og løgtingssamtyktin um at hjún skulu skattast hvør sær, fer bara at koma teimum allar hægstløntu til góðar, og tað kemur ikki upp á tal einsamalt. Tí fevna ætlaðu broytingarnar í skattalógini eisini um at veita teimum lágløntu ein skattalætta.

Hann sigur, at fleiri tingmenn, hann hevur tosað við, hava boðað honum frá, at treytirnar í samtyktini um skatting av hjúnum skulu ikki takast so bókstaviliga.

– Tað er ómetaliga truplult at arbeiða, tá ið Løgtingið samtykkir eitt, men at løgtingsmenn so aftaná lata meg vita at tað skal ikki takast bókstaviliga. Tað sigur mær í hvussu so er so mikið sum tað, at tað er neyðugt við eini nágreiniligari politiskari viðgerð av málinum, fyri at fáa greiði á, hvør tann politiski viljin í veruleikanum er.

Hann sigur, at samtyktin um at hjún skulu skattast hvør sær, kemur bara teimum hægstløntu til góðar, sum hava ráð til at lata annan hjúnafelagan vera heima.

– Øll tey, har bæði noyðast at arbeiða úti fyri at fáa endarnar at røkka saman, og tað er nógv tann størsta fjøldin av fólki, fáa ikki eitt oyra burturúr hesi samtyktini.

– Tað eru bara tey heilt væl løntu, sum forvinna omanfyri eina hálva millión um árið, og har annar hjúnafelagin er heima, sum fara hinvegin at fáa ein veldugan fyrimun.

– Treytin fyri at fáa ágóðan av hesum er, at annar hjúnafelagin als onga inntøku hevur. Tvs, at hevur annar hjúnafelagin arbeiði bara nakrar tímar um vikuna, fáa tey onki burturúr samtyktini um at hjún skulu skattast hvør sær.

– Tað vil aftur siga, at tað verður ein ørgrynna av fólki, sum fara at siga arbeiði frá sær, tí hereftir fer tað ikki at loysa seg at forvinna nakrar fáa túsund krónur um mánaðin.

Karsten Hansen sigur, at tað fer so aftur at føra við sær, at trot verður á arbeiðsmegi nógvastaðni, tí tað er onki arbeiðsloysi sum er. Og avleiðingin av tí verður so aftur, at búskapurin verður enn meiri hitaður.

Hann sigur, at heldur ikki fáa eitt nú einkjur heldur ongan ágóða av samtyktini.

– Tvørturímóti fer tað at gera korini enn verri hjá teimum, sum longu eru illa fyri, tí hitnar búskapurin enn meiri, fara eisini prísirnir upp.

## Ikki uppá tal

Karsten Hansen sigur tí, at broytingarnar, sum verða gjørdar í skattalógini eru sostatt sera umfatandi og skulu síggjast í einum stórum samanhangi.

– Tað kemur ikki upp á tal, at eg fari at broyta skattalógina, so at tað bara verða tey við teimum heilt høgu inntøkunum, sum fáa skattalætta. Hjá mær snýr tað seg fyrst og fremst um at veita øllum teimum, sum ikki fáa liva uttan við teimum inntøkum, ein skattalætta.

– Tí kann løgtingssamtyktin, um at hjún skulu skattast hvør sær, ikki brúkast sum hon er og tað eru løgtingslimir sum heild samdir við mær í, sigur Karsten Hansen.



*Eg fari ikki at broyta skattalógina uttan so, at lá- og miðalinntøkurnar ikki eisini fáa skattalætta, sigur Karsten Hansen. Hann sigur, at nýggja løgtingssamtyktin um at hjún skulu skattast hvør sær, kann ikki brúkast sum hon er*

*Myndim er tilvildarlig*

gult7 cyan7 magenta7 svart7



# Íslendski forsetin vitjar føroyingar

**Um góðar tvær vikur sleppa føroyingar at upplia næstu almennu forsetavitjanina í Føroya søgu. Eftir innbjóðan frá løgmanni vitjar íslendski forsetin, Ólafur Ragnar Grímsson Føroyar í døgnum 28. til 30. juni**

FORSETAVITJAN
*John Johannessen*

Talan verður um vitjan á hægsta tignarstigi, tá íslendski forsetin, Ólafur Ragnar Grímsson, kemur til Føroya á almenna vitjan 28. juni.

Hetta er aðru ferð, at føroyingar sleppa at uppliva, at ein forseti vitjar oyggjarnar. Fyrstu ferð, vit høvdu forsetavitjan, var tað eisini ein íslendskur forseti, ið vitjaði. Hetta var í september í 1987, og var tað Vígdis Finnbogadóttir, sum sat sum forseti Íslands í 16 ár, ið vitjaði.

Forsetavitjan hevur sama tignarstig, sum ein kongaella drotningavitjan. Og er tað tí ein stórur heiður fyri Løgmansskrivstovuna at vera vertur fyri íslendsku vitjanini.

## Mátti fáa loyvi frá drotningini

Men føroyingar kunnu ikki bara soleiðis uttan nakað bjóða einum forseta at koma at vitja.

Av tí, at Føroyar eru í ríkisfelagsskapi við Danmark, er tað Margreta drotning, ið hevur hægstu tign í landinum, meðan løgmaður hevur somu tign, sum ein forsætisráðharri í øðrum londum. Íslendski forsetin hevur somu tign, sum drotningin. Og tí er tað drotningin, ið formliga eigur at vera vertur fyri almennari forsetavitjan í Føroyum. Tí mátti løgmaður umvegis Ríkisumboðið fáa loyvi frá Margretu drotning til at vera umboð í hennara stað, tá íslendski forsetin kemur á vitjan.

## Vil hitta fólkið

Sambært Løgmansskrivstovuni, hevur íslendski forsetin ynskt at vera saman við vanliga fólkinum á vitjanini í Føroyum. Tí hevur Løgmansskrivstovan lagt vitjanina soleiðis til rættis, at forsetin sleppur kring oyggjarnar, og at hann kemur í samband við vanlig fólk, í staðin fyri bert politikarar og embætismenn.

Hetta sæst millum annað á skránni fyri vitjanina í Klaksvík, har forsetin hevur ynskt, at Brimil skal leggja at við Kósabrúnna, so hann kemur millum fólkið, ið starvast á brúnni og á Kósavirkinum.

Kortini vera eisini meira formell tiltøk, meðan forsetin vitjar. Millum annað skal løgmaður vera vertur fyri døgurða í Roykstovuni í Kirkjubø, og íslendski forsetin skal vera vertur fyri døgurða á Hafnia.

Ólafur Ragnar Grímsson fer aftur til Íslands við flogfari sínum eftir kvøldsetu í skúlanum í Miðvági leygarkvøldið 30. juni.

## Íslendski fíggjarmálaráðharrin vitjar

**Karsten Hansen, landsstýrismaður í fíggjarmálum, verður vertur, tá íslendski fíggjarmálaráðharrin, Geir M. Haarde og kona hansara, Inga Jóna þórardóttir koma á almenna vitjan í Føroyum frá 24. til 27. juni**

ALMENN VITJAN
*John Johannessen*

Íslendski fíggjarmálaráðharrin við fylgi kemur til Føroya á almenna vitjan hjá Karsten Hansen, landsstýrismanni í fíggjarmálum, um tvær vikur.

Íslendsku gestirnir koma til Føroya við flogfari sunnukvøldið 24. juni, og mánadagin verður vitjað hjá lømanni í Tinganesi, hjá Tórshavnar býráð, í Norðurlandahúsinum og í Listaskálanum. Mánakvøldið verður vanligi almenni døgurðin í Roykstovuni í Kirkjubø.

Týsdagin fer fylgið til Norðoyggjar. Vitjað verður hjá Klaksvíkar býráð og hjá einari útflutningsfyritøku.

Í Klaksvík, sum er heimstaðurin hjá Karsten Hansen, landsstýrismanni í fíggjarmálum, verður fundur millum íslendska fíggjarmálaráðharran og landsstýrismannin um framtíðar búskaparliga samstarvið millum Føroyar og Ísland.

Eftir fundin í Klaksvík verður farið við bussi til Viðareiðis, og síðani við báti til Mikladals í Kalsoynni, har gestirnir skulu gista.

Íslendska fylgið fer heim aftur til Íslands við flogfari mikudagin 27. juni.

# Tórbjørn stuðlar grønlendskum málstríði

**Fráfarandi landsstýrismaðurin í mentamálum, Tórbjørn Jacobsen, hevur sent grønlendsku landsstýriskvinnuni í mentamálum bræv, har hann sigur seg stuðla grønlendingunum í stríðnum at fáa grønlendska málið til málið í grønlendska skúlanum**

MÁLSTRÍÐ
*John Johannessen*



Í brævi til grønlendsku landsstýriskvinnuna í mentamálum, Lise Skifte Lennert, harmast fráfarandi føroyski landsstýrismaðurin í mentamálum, Tórbjørn Jacobsen, um viðferðina, grølendska málið fær av dønum.

Tórbjørn Jacobsen er argur inn á eini grein í danska blaðnum Jyllands-Posten 10 juni í ár, sum snýr seg um grønlendska málið. Og hann heldur, at danir niðurgera grønlendska málið, eins og tað føroyska.

Tórbjørn Jacobsen skrivar soleiðis til grønlendsku landsstýriskvinnuna:

Kære Lise!

Jeg skriver til dig efter at jeg i danske medier (Jyllands Posten, 10.06.01) har set en helt uhørt behandling af den grønlandske sprogpolitik i skolevæsenet. Det helt naturlige folkeretlige krav om grønlandsk sprog i den grønlandske skole bliver belyst som ”nationalisme” og ”racisme” mod danske børn i Grønland.

Jeg har sejlet langs Grønlands kyster i mange år. Jeg kender hver bygd og hver by og har mange grønlandske og danske venner i Grønland. Jeg har stor respekt for grønlandsk sprog og kultur, og det sårer mig derfor meget at se den nedgørelse, som Jyllands Posten og deres informanter giver udtryk for.

Jeg skriver også til dig, fordi vi er i samme båd. Vi er underlagt samme statsmagt - hvilket jo også er grunden til, at jeg skriver til dig på dansk.

Også på Færøerne har vi mange gange oplevet, at danske myndigheder nedvurderer vores sprog.

Og denne undertykkelse sker stadigvæk. Så sent som i fjor blev det færøske (og det grønlandske) sprog i internationale konventioner rubriceret som ”mindretalssprog” eller ”regionalsprog” af danske myndigheder – på trods af kraftige protester fra færøsk side.

Jeg kan oplyse, at jeg flere gange personligt har skrevet til den danske kulturminister i et forsøg på at få en forklaring på hvorfor danske myndigheder handler stik imod de færøske ønsker i dette spørgsmål, men kulturministeren har på arrogant vis blankt afvist at indgå i en dialog om sagen.

For os, som kender både den færøske og grønlandske historie, forekommer det derfor helt absurd, at der fra dansk side nu tales om grønlandsk racisme og nationalisme. Op igennem hele sidste århundrede har vi jo kæmpet en sprog- og kulturkamp i vore lande, hvor vore sprog har været undertrykt i den danske stat.

Et resultat af denne undertrykkelse, er det danske sprogs dominans i store dele af den grønlandske skole. Jeg ved om færøske børn, der efter flere år i Grønland ikke har lært et eneste ord grønlandsk. De lærte kun dansk, fordi skolen fuldt og helt var dansk. På Færøerne vækker det undren, at grønlandsk kan være så tilsidesat i Grønland, og det er naturligvis helt uacceptabelt. At man i Grønland nu forsøger at rette op på dette, er ikke nationalisme. At modsætte sig at grønlandsk får sine helt naturlige rettigheder i Grønland, er tværtimod tegn på en holdning, som der kan sættes mange mindre pæne betegnelser på.

At virkeligheden nu bliver vendt på hovedet og at grønlandske myndigheder bliver beskyldt for ”nationalisme” og ”racisme” i sprogspørgsmålet, er derfor under grænsen for, hvad der kan accepteres. Og jeg forstår godt, hvis det vækker en vis vrede.

Hele debatten minder jo om baggrunden for ”fødestedskriteriet”, der indtil for få år siden udgjorde en lovmæssig forskelsbehandling, hvor alle, der ikke var født i Grønland, fik bedre løn og privilegier i forhold til dem, der var født i Grønland.

Til slut vil jeg sige, at jeg ikke håber at I grønlændere vil falde i samme grøft som de danske medier og myndigheder, der nu omtaler jer med de omtalte nedværdigende betegnelser. Vi bør give både danskere og andre nationaliteter ligebehandling i vort samfund og i vort skolesystem - og vi må aldrig finde på at nedgøre andre nationaliteter.

Dette handler om folkelig ligestilling, og de grønlandske skolemyndigheder har ikke bare ret, men også pligt til at gøre det, de gør.

Jeg støtter helhjertet jeres lange kamp for at skabe en grønlandsk skole.

Med venlig hilsen,

Tórbjørn Jacobsen
Kulturminister
Føroyar